# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein skilagóð avgerð

Samgongan hevur gjørt av at byggja nýggjan studentaskúla í Marknagili. Skúlin verður bygdur saman við tí miðnámsskúladepli, sum undanfrana samgonga hevði gjørt av at lata byggja á sama stað. Hetta er ein skilagóð avgerð. Við hesi avgerð eru vit aftur við upprunaligu ætlanina við deplinum í Marknagili. Henda ætlan gjørdist orsakað av politiskari ósemju í undanfarnu samgongu av ongum. Samstundis, sum farið verður undir at fyrireika verksetanina av hesi avgerð, verður farið undir at fremja nakrar heilt átrokandi ábøtur á skúlan í Hoydølum.

Tað er væl skiljandi, at tað hjá nógvum kenst eitt sindur sárt at flyta úr Hoydølum. Staðið er vakurt og hugnaligt og har hevur skúlin verið síðan sekstiárini, so stovnurin er tætt knýttur at umhvørvinum. Hinvegin standa vit frammanfyri sera stórum og víttfevnandi broytingum á miðnámsøkinum. Bygnaðurin skal broytast, so vit fáa deplar, innihaldið skal broytast og tillagast teimum alt vaksandi krøvunum frá altjóðagerð og samfelagsbroytingum og fleiri miðnámsskúlareformar skula samskipast. Alt hetta krevur nakrar fysiskar broytingar, og hetta krevur teir best hugsandi karmar. Hesir karmar kunnu ikki skapast í Hoydølum, hóast eingin ivast í, at hetta hevði verið ynskiligt, um tað bar til.

Samstundis sum avgerðin um at byggja studentaskúlan saman við deplinum í Marknagili er tikin, hevur samgongan eisini gjørt av at byrja við studentaskúlanum. Hetta er ein radikal broyting av upprunaætlanini hjá undanfarnu samgongu. Hendan ætlaði sum kunnugt at byrja við vinnuskúlunum. Avgerðin fer neyvan at falla í góða jørð hjá vinnulívinum, og tað er væl skiljandi. Týdningarmikið er, at tekniski skúli og handilsskúli ikki missa við hesi avgerð. Nú henda stóra avgerð er tikin, og studentaskúlin saman við tekniska skúla og handilsskúlanum fer at verða í Marknagili, eigur avgerðin alt fyri eitt at verða fylgd av eini avgerð um at byggja okkara nýggja universitet oman fyri Marknagilsvegin á økið, sum er lagt av til hetta endamál. Verður hetta gjørt nú, so eru vit væl brynjað til tey krøv, sum nútíðin og altjóðagerðin seta ungdómi og samfelag.

**Sosialurin**

# Petur Háberg við nýggjari fløgum í nýggjum plátufelag

**Spildurnýggja plátufelagið, "Rock Pipit Records" gevur út nýggja fløgu við Peturi Háberg**

TÓNLEIKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Eitt nýtt plátufelag hevur sæð dagsins ljós. Talan er um smápartafelagið Rock Pipit Records. Endamál felagsins er at menna føroyska tónleikalívið og serliga at fokusera upp á útflutning av føroyskuym tónleiki.

Felagið er sett á stovn av fýra føroyingum, ið hvør á sín hátt hava verið við í føroyska tónleikalívinum í nógv ár. Stigtakarar til felagið eru Símun J. Hansen, ið er juralesandi, Jákup Heinesen, gókendur grannskoðari, Billy Hansan, sjálvstøguður vinnurekandi og Andrew Djurhuus, flogmekanikkari hjá Atlantic Airways.

Andrew Djurhuus er stjóri, og Símun J. Hansen er formaður í felagnum.

Enn er felagið nýtt, men leiðslan í felagnum vónar, at felagið kann arbeiða saman við øðrum sum geva út føroyskan tónleik fyri saman at kunna menna útflutningin av tónleikinum.

Fyrsta plátukontraktin er undirskrivað, og er talan um eitt føroyskt tónlistafólk, ið seinastu árini hevur gjørt vart við seg í føroyska tónleikaheiminum, nevniliga Petur Háberg.

Petur og bólkur hansara framførdu á øllum festivalunum í fjør, og hann hevur í fleiri ár arbeitt við at savna tilfar til eina útgávu. Petur hevur sín egna bólk, ið eisni spælir á fløguni, og Hans Poulsen framleiðir fløguna.

Eftir ætlan kemur ein stakfløga við fýra nýggjum sangum á marknaðin í apríl. Sjálv fløgan kemur út í seinni í ár.

Á fløguni vera ikki færri enn 13 sangir, ið Petur sjálvur hevur gjørt.

Listanavnið hjá Petur og bólkinum verður framyvir "Bet You Are William".



*Hetta er fyrsta fløguútgávan hjá Peturi Háberg, sum hevur verið nógv at hoyrt á konsertum og festivalum. Nýggja plátufelagið væntar sær nógv av hesi útgávu – sum eisini skal marknaðarførast uttanlands*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.